## Gallas hótti við at gera sjálvmál

Nýinnkeypti Arsenal-verjuleikarin, William Gallas, tímdi eftir øllum at døma so illa at vera í Chelsea, at hann hótti við at skora sjálvmál, verða útvístur ella spæla illa við vilja, um hann varð settur at spæla fyri Chelsea í Premier League. Tað sigur fyrrverandi felag hansara í einum tíðindaskrivi. Gallas setti í summar føtur í spenni fyri at sleppa burtur frá Chelsea, og tað eydnaðist honum eisini at sleppa til Arsenal at spæla.

William Gallas, sum er fraklendingur, hevur í morgun svarað ákærunum frá Chelsea. Hann noktar fyri, at hann hótti við at gera sjálvmál og skýrir hann ákærurnar frá Chelsea at vera ørvitisligar.




## Forsetin hjá Inter deyður

Forsetin hjá italska stórfelagnum Inter, Giacinto Facchetti, mátti í gjár geva skarvin yvir eftir drúgva sjúkralegu, og doyði hann 64 ára gamal. Fyrrverandi landsliðsleikarin í italska landsliðnum var at kalla ímyndin av Catenaccio-spælskipanini, og í sínum 476 dystum fyri Inter vann tvey italsk meistaraheiti, og tvær ferðir var hann við at lyfta Inter á ovastu rók í Evropa Cup. Giacinto Facchetti var liðformaður á landsliðnum, og fekk hann 94 dystir í bláa búnanum. Síðani 2004 var Giacinto Facchetti forseti í Inter, men í dag verður boðað frá, at gamla legendan nú er deyð av krabbameini.



*Hans Pauli Poulsen á Sólvindi á veg um málstrikuna framman fyri Gunrid á Plógv á Lokki*

*Mynd Brandur í Dali*

# Sólvindur endurvann FM heitið

**Sólvindur vann FM-heitið í tvíspor, og Máni eigur nú travmetini á øllum breytum í landinum. Tað er greitt eftir at ársins seinasta kappríðing var í Marknagili leygardagin**

KAPPRÍÐING

Ársins seinasta kappríðingin hetta kappingarárið, varð hildin á breytini hjá Føroya Ríðingarfelag í Marknagili leygardagin.

Undan kappingini var stórur spenningur um, hvørt tað fór at eydnast Sólvindi hjá Maritu Askham at endurvinna FM heitið í tvíspor ella ikki. Sólvindur hevur vunnið FM fimm ár á rað, men hevur í ár fingið stóra kapping frá Lokki hjá Rólanti Reinert.

Undan FM var støðan tann, at Lokkur var eitt stig frammanfyri Sólvind, og tað merkti, at um Sólvindur ætlaði at endurvinna FM heitið, skuldi hann vinna á Lokki.

Teir báðir hestarnir vóru eisini paraðir saman í seinasta lopinum hendan góðveðursdagin. Sólvindur við Hans Paula Poulsen á baki og Lokkur við Gundrid á Plógv á baki.

Hestarnir byrjaðu sera javnt. Tann guli Sólvindur fekk kanska eina eitt sindur betri byrjan, men tann svarti Lokkur var beint í hølinum á honum.

Tá hestarnir høvdu runnið áleið 300 metrar av tí 500 metra longu breytini, royndi Lokkur at taka Sólvind. Hans Pauli Poulsen og Sólvindur svaraðu tó aftur, og hildu munin á mál og endurvunnu harvið FM. Hetta er sætta FM-heitið Sólvindur vinnur rað. Lokkur og Gunrid á Plógv gjørdist nummar tvey, og Kambur við Dinu Splidt á baki gjørdist nummar trý.

### Máni sló met

Eisini í trav var stórur spenningur undan kappingini, men hesaferð var tað ikki FM kappingin sum var orsøk til spenningin.

Hana hevði Máni hjá Knúti Lützen longu tryggjað sær undan seinastu kappingini. Máni hevur havt eitt framúr kappingarár, har hann hevur tikið metini á breytunum á Leynavatni og vesturi í Vágunum. Hann hevur tó fingið sera harða kapping frá Glettu hjá Leif Sjúrða Petersen úr Leynum, og eisini Drotning, sum Knút Lützen eisini eigur, kundi væl væntast at blanda seg í dystin.

Tað gjørdist tó enn einaferð Máni við Knúti Lützen sjálvum á baki, sum vann. Hann vann í einum framúr góðum dysti við Glettu við Marneri Joensen á baki. Bæði rossini slóu gamla metið á breytini í Marknagili.

Máni og Knút átti tó munin soleiðis, at Máni nú eigur travmetið á øllum kappríðingarbreytum í landinum. Tíðirnar vóru hjá Mána 50,3 sekund, og hjá Glettu 50,8 sek.

Drotningin við Kristfríð Jacobsen á baki fann ikki tað rætta stevið hendan dagin, og tað gav pláss til Strúk hjá Tórða Kruse av Eiði at fara við 3 plássinum. Karin Abrahamsen reið við Strúki.

### Fenja vann tvíspor ung

Hjá teimun ungu var tað Fenja hjá Regini Hansen við Tóra S. Hansen á baki sum vann. Hugin hjá Gudmundi Hansen við Hildur á Plógv á baki gjørdist nummar tvey, og á triðja plássi kom Prú hjá Berg hestum við Beintu G. Davidsen á baki.

Føroyameistari hjá teimum ungu gjørdist Hugin og Hildur á Plógv. Tvíspor ll flokk vann The Duke hjá Jóhan á Plógv við Annfinn Reinert á Baki. Nummar tvey var Nora hjá Andrias C. Lützen við Óla Jóhan Láberg á baki, og triðjaplássi fór til Savoy hjá Joan Hansen úr Kollafirði, og har reið Joan sjálv.

Oldboysflokkin vann Sina við fyrrnevnda Hans Paula Poulsen á baki, so ikki kann sigast annað enn at hetta gjørdist ein góður dagur hjá Hans Paula Poulsen.

## Nýggj kapping á skránni

Leygardagin 23. september verður skipað fyri sokallaðari adventurrace renning úr Kvívík til Havnar. Teinurin verður umleið 30 kilometrar.

Adventurrace er ein liðkapping, ið leggur stóran dent á samstarv (teambuilding) og er eitt slag av kunningarrenning, har kunningarpostarnir eru ymiskar forðingar.

Forðingarnar eru ymiskar uppgávur, ið skulu loysast. Sum dømi kann nevnast: At byggja tann hægsta varðan, at navngeva fuglar, byggja og flúgva við drekum, og mangt annað, ið fyriskipararnir finna uppá. Hvussu leiðin verður løgd, og hvørjar uppgávurnar vera, vita bert fyrireikararnir.

Fyri at luttaka krevst eitt lið við fýra persónum. Liðini kunnu vera manslið, kvinnulið ella blandað lið. Harafturat er møguleiki at velja at luttaka sum motionistar ella væl vand. Motionistarnir fáa eina lættari leið enn hini, og krevur hon tí ikki, at luttakararnir eru í fysiskum toppformi, umframt at motionistaliðini bert nýtast at luttaka við trimum persónum.

Tann strævna leiðin er gjørd til tey liðini, ið meta seg at vera væl fyri og vilja hava stórar avbjóðingar. Byrjað verður í Kvívík leygarmorgun klokkan 08.00 við morgunmati, og endað verður við Føroya Studentaskúla í Hoydølum umleið kl. 18:00 við nátturða.

Fyriskiparar av kappingini eru Bjørn Krog og Hans Mikkelsen.